ÚT AT KOYRA

# Bilstøðin Auto 50 ár í 2002

**Í sambandi við at bilstøðin Auto í Havn verður 50 ár komandi ár, verður í hesum døgum savnað tilfar til eitt minnisrit, sum eftir ætlan skal koma út til føðingardagin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*




*Auto 1234. Petur í Gong, byggimeistari, stóð fyri byggingini av støðini, ið varð liðug í 1956. Árið eftir góvu Napoleon Smith og Olaf Hansen tilboð uppá at mála støðina. H.C.W. Tórgarð, arkitektur, teknaði støðina, sum var gjørd í samstarvi við P/F Shell.*
*Bilurin inni við støðina, ein Fiat 124 hjá Eigil Gunnarsson, var ein av fyrstu Fiat bilunum í Føroyum. Síðan er ein grønur Peugeot 403 hjá Børge Andreasen, og ein hvítur og reyður Ford Consul hjá Jákup Berg*

*Mynd: Eigil Gunnarsson*

Bilstøðin bleiv stovnað 17. desember í 1952 við navninum P/F Taxa A/S, og hildu teir til í Lucas Debesargøtu, har sum Hans Johs. Clementsen hevði bilverkstað í mong ár. William Sloan, ið átti húsið, hevði sjálvur havt bilstøðina Taxa har, men var givin og leigaði stovnarunum av hesi nýggju støðini hølini og navnið Taxa. Teir sum stovnaðu støðina vóru: Jóhannes Berg, Eigil Gunnarsson, Kaysten Andreasen, Henry Svensson og Andrew Djurhuus.

## Nýtt navn

Árið eftir at støðin varð stovnað, keypir Zacharias Niclasen á Skipafelagnum ognina, og bilstøðin flutti í onnur hølir, í Kongagøtu 2, har leigað varð í niðaru hædd. Matstovan hjá Effe Mohr var í erva. Zacharias Niclasen fekk seinni rættin til navnið Taxa. Tá varð neyðugt við nýggjum navni, og á eyka aðalfundi tann 20. apríl 1955 varð samtykt, at navnið skuldi verða til P/F Auto A/S. Hetta árið varð eitt grundøki millum N. Finsensgøtu og L. Debesargøtu keypt frá Jens Paula av Reyni.

## Byggja nýggja støð

Av tí at Havnará rann ígjøgnum økið, mátti ein brúgv gerast fyri at fáa innkoyring frá N. Finsensgøtu. Støðin bleiv síðan bygd, fyri ein part yvir sjálva brúnna og yvir ímóti L. Debesargøtu. Hetta var ein snøgg støð eftir tátíðar byggisniði, við avgreiðslurúmi, køki, bíðirúmi, stórari garasju við grøv, so bilførarnir sjálvir kundu umvæla sínar bilar. Eisini var olju- og bensinsøla og góðar umstøður at vaska bilar. Støðin bleiv liðug í 1956, og varð bygd í samstarvi við P/F Shell.



*Her er Óla Christian Jacobsen júst liðugur at vaska sín Morris Oxford. Óla Christian var kendur fyri at røkja sínar bilar væl. Báðar myndir eru tiknar síðst í fimmtiárunum*
*Mynd: Eigil Gunnarsson*

## Myndir og annað tilfar

Tey, sum eiga myndir ella vita um onkran, sum eigur myndir ella annað tilfar í sambandi við bilstøðina Auto, ella av hýruvognum hjá støðini og øðrum í hesum sambandi, eru vælkomin at siga frá tel. 316135 / 216135 ella teldupost: maggi@sosialurin.fo . Tilfarið verður skannað, og leverað aftur til eigaran.




# Kunngerð

**um framløgu av byggisamtykt og bygdaskipan fyri Hvalvíkar kommunu.**

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til endurskoðan av byggisamtyktini og bygdaskipanini fyri Hvalvíkar kommunu, verður lagt fram til almenna eftirskoðan á kommunuskrivstovuni frá 27. sept. 2001 til 18. okt. 2001, báðir dagar íroknaðir.

Kommunuskrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.00 til 13.00.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, ið skulu vera skrivlig, mugu vera bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi 27. desember.

Hvalvíkar kommuna

# Ársaðalfundurin

Sagt verður frá, at ársaðalfundurin hjá Róðrarsamband Føroya, verður í ÍSF húsinum, leygardagin 27.10.2001 kl. 10.00

Skrá sambært grein 4 í lógum fyri Róðrarsamband Føroya

Róðrarsamband Føroya

# Teoriskúlin á Glyvrum

Nýtt skeið byrjar hóskvøldið kl. 19.00

Johan Beder, tel. 210 821
Ole Lykke, tel. 220 972
Hugo Kristiansen, tel. 225 225

Sosialurin - 311820

# Í Býin

- hvønn hósdag

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pleygufamilja

Barnaverndarnevndin í Tórshavnar kommunu søkir við hesum eftir familju á bygd, ið hevur hug at gerast pleygufamilja hjá eini 14 ára gamlari gentu.

Pleygufamiljan skal geva gentuni tryggleika, neyðuga umsorgan og ein mennandi gerandisdag.

Vit vænta av familjuni, at hon er samstarvshugað mótvegis familjuni hjá barninum, barnaverndini og øðrum samstarvspørtum.

**Meira fæst at vita**
Um tit hava áhuga og ynskja at fáa meira at vita, kunnu tit venda tykkum til Sosialu deild hjá Tórshavnar kommunu tlf. 315160 lok.150 og spyrja eftir Onnu Mariu Troest, sosialráðgeva.

**Umsóknir**
Umsóknirnar, ið skulu vera nevndini í hendi innan tann 4.oktober 2001, skulu stílast til barnaverndarnevndina, Tórshavnar kommuna, postrúm 32, 110 Tórshavn.

SNARSKIVAN

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin

Sosialurin - 311820


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3117, Sp/f Fregnir, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar:
26.07.2001.
Kapitalur:
Hækking við kr. 100.000,00 til kr. 260.000,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 25. september 2001

Kristin Balle


SJÓ-FRAKT
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
SAFARI TRANSPORT
www.safari.fo
Tel. 32 22 22
Sosialurin - 311820


# Tiltøk í oktober 2001

***Álendska framsýningin »Við seglskútum um Kap Horn«, verður til 22. oktober.***

***Gallarí Oyggin, Tvøroyri. Málninga- og grafikkframsýningin hjá Astri Luihn er til og við 21. oktober.***

***Tónleikatiltak við kirkjukonsertum. Luttakarar: Laila Nielsen, Jens Smith, Jens Chr. Guttesen og Árni Hansen 16. okt. í Oyndarfirði, 17. okt. í Vági, 18. okt. á Tvøroyri og 20. okt. í Havn***

***Framsýningin hjá Palla Greogoriussen, arkitekti, um tær føroysku kirkjurnar er í Umeå, Svøríki dagarnar 13.-19. oktober***

**Mánadagur 01. kl. 19.00**
Filmsfelagið Klipp sýnir amerikanska filmin "Pollock". Leikstjórnað hevur Ed Harris.
Filmurin verður sýndur í Havnar Bio

**Hósdagur 04. kl. 19.30**
Konsert v/Vocal Group Ars Nova, Danmark

**Leygardagur 06. kl. 14.00**
Baltiska framsýningin "Ancient Trees of Estonia" letur upp

**Leygardagur 06. kl. 16.00**
Jazzkonsert v/Raivo Tafenau & Meelis Vind, Baltikum

**Sunnudagur 07. kl. 19.30**
Orfeus, Tónlistarfelag Norðurlandahúsins skipar fyri konsert í Býráðshøllini í Runavík.
Luttakarar: Rúni Bæk, violog Jóhannes Andreasen, klaver

**Mikudagur 10. kl. 19.30**
Orfeus, Tónlistarfelag Norðurlandahúsins heldur konsert.
Luttakarar: Rúni Bæk, viól og Jóhannes Andreasen, klaver

**Fríggjadagur 12. kl. 20.00**
Føroyskur barnadansur v/Dansifelagnum í Havn

**Leygardagur 13. kl. 14.00**
Framsýningin hjá Annette Holdensen, Danmark, letur upp

**Hósdagur 18. kl. 19.30**
Konsert, Vetrarjazzur

**Mánadagur 22. kl. 20.00**
Handan/Mentanarvirðisløn Landsins 2001

**Mikudagur 24. kl. 19.30**
MBF fyri fundi og framsýning.
Hetta er í sambandi við 20 ára dagin hjá felagnum

**Fríggjadagur 26. kl. 20.00**
Føroyskur barnadansur v/Dansifelagnum í Havn

**Leygardagur 27. kl. 10.00**
Fróðardagur. Fundur hjá Føroya Fróðskaparfelagi

**Sunnudagur 28. kl. 16.00**
Svenskt vísukvøld

**Týsdagur 30. kl. 19.30**
Konsert v/Aina Kalniciema, Estland

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail:nlh@nlh.fo · http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650